Ítróttar
Sosialurin
Nr. 78 • mánadagur • 24. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Málið er 9 stig í trimum tøkum

**NSÍ venjarin rósar sínum monnum fyri at hava tikið seg saman, eftir at tað leingi hevur verið ov nógv so sum so**

**NSÍ**
*Jóannes Hansen*

Manningarligu fyritreytirnar áttu at verið fyri plássið millum tey fremstu. Hóast tað hevur gingið striltið fyrstu umførini, so ætla teir í NSÍ framvegis at blanda seg upp í oddastríðið.

– Í vikuni settu vit okkum fyri, at vit í trimum teimum næstu uppgerðunum skuldu fáa níggju stig. Fyrsta royndin eydnaðist til fulnar, og so fæst at síggja, hvussu tað fer at hilnast í tveimum teimum næstu royndunum, sum eisini verða móti feløgum úr Eysturoy – fyrst á útivølli móti GÍ og síðani á heimavølli móti ÍF.

Hetta staðfesti NSÍ venjarin, Trygvi Mortensen, eftir 2-0 sigurin á EB/Streymi, sum var tann fyrsti á heimavølli í ár.

### Má liva við veruleikanum

Eftir fýra tey fyrstu umførini var NSÍ tó triði aftast. Nógv hevur verið tosað í Runavíkar kommunu – í hvssu so er í eystarapartinum – og venjarin legði kortini á borðið í leikskránni:

– Vit kunnu ikki finna nakra umbering fyri ússaliga innsatsin, tí her er eingin umbering! Vit hava í vikuni tosað um tingini fyri at venda gongdini. Vit halda okkum hava vaskað talvuna reina, byrja umaftur og stevna frameftir, tí tað vilja vit.



*Trýstið á NSÍ-venjaran hevur verið stórt. Men Trygvi Mortensen staðfestir, at slíkir tankar hevur hann hvørki ráð ella stundir at fáast við*

Tað hevur ikki verið frítt, at tosið í Runavík eisini hevur snúð seg um venjaran og framtíðina hjá honum, um tað aftur kiksaði móti EB/Streymi.

– Sovorðið mást tú sum venjari liva við. Hjá okkum á og kring liðið hevur verið mest týdningarmikið at fokusera á tað, sum alt snýr seg um, og eg eri væl nøgdur við avrikið, sum spælararnir vístu.

Hvat var øðrvísi hesa ferð, enn tað hevur verið?

– Tað hevði týdning, at Jústinus R. Hansen var komin aftur á miðvøllin, eftir at hann hevur verið skaddur. Christian Høgni var sera væl upplagdur á toppinum, og eg eri væl nøgdur við verjuavrikið. Hugburðurin var rættur, og okkara menn vunnu fleiri nærdystir og stríð um returbóltar, enn teir hava gjørt tær undanfarnu ferðirnar. Serliga í Gundadali móti HB var hetta heilt galið, heldur NSÍ venjarin.

### Christian Høgni liðformaður

Burtursæð frá at Jústinus R. Hansen var komin fyri seg eftir langan skaðasteðg var NSÍ liðið einki broytt. Veteranarnir vóru allir afturvaldir, og fleiri av evnaríku ungu monnunum - eitt nú Jóhan Troest Davidsen og Hjalmar Dalbúð - vóru á beinkinum.

– Í sovornum støðum eiga eldru spælararnir at ganga undan, og tað gjørdu teir hesa ferð, heldur NSÍ venjarin.

Einasta eyðsýnda broytingin sammett við undanfarnu umførini var tann, at Jens Martin Knudsen ikki hevði bandið hjá liðformanninum. Tað var flutt frá aftasta manninum og fram til fremsta mannin. Sunnudagin var Christian Høgni Jacobsen liðformaður.

– Onkur helt, at tað kanska ikki var rætt, at málverjin var liðformaður. Tí gjørdu vit av at hava atkvøðugreiðslu um sessin. Tað var um reppið, at Jens Martin varð afturvaldur, men valið fall á Christian Høgna, og avrikið hjá honum sunnudagin vísti, at tað avgjørt ikki darvaði spælinum hjá honum. At Jens Martin framvegis er stinnur millum stólparnar bar væl til at staðfesta móti EB/Streymi, sigur væl nøgdi venjarin, sum – í hvussu so er fyribils – er sloppin av við krepputosið kring NSÍ.

# VB-kvinnur fáa nýggjan venjara

**VB hevur sett Egill Steintórsson í starv sum venjara hjá kvinnuliðnum í hondbólti, og hann roknar við broytingum á liðnum næsta kappingarár**

**HONDBÓLTUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Egill Steintórsson verður nýggjur venjari hjá hondbóltskvinnunum í Vági. Útlendski venjarin undanfarin ár heldur ikki fram, og tí tekur Egill vil starvinum.

– Eg var eitt sindur við móti endanum í fjør, tí venjarin var burturstaddur onkran dyst. Nú havi eg so fingið boðið starvið fast, og eg havi tikið av, sigur Egill Steintórsson.

Egill kom í 1986 úr Reykjavík til Tvøroyrar at spæla fótbólt við TB. Hann spældi tvey ár á Tvøroyri og flutti so suður til Vágs at spæla. Har var hann toppskjútti og álopsspæari í nógv ár, og hann hevur verið búsitandi í Vági síðani 1987. Í februar mánaði í ár vóru tað liðin 20 ár, síðani Egill kom til landið at búgva.

### Spennandi uppgáva

Egill hevur eisini verið virkin innan hondbóltin, og nú skal hann taka við leiðsluni av kvinnuliðnum í hondbólti, sum hevur fingið góð úrslit seinastu árini.

– Hetta er ein spennandi uppgáva. Spælarar koma og fara, og tí rokni eg við onkrum broytingum á liðnum næsta kappingarár. Móti endanum av seinastu kapping vóru nógvir av spælarunum undir 20 ára gamlir, og har eru fleiri spennandi spælarar á veg, sigur Egill.

Tað verða tó ikki bert ungir spælarar úr Vági á liðnum hjá VB næsta vetur. Felagið skrivar á heimasíðu sínari, at ársins spælari í ár, Daiva Toumaite, kemur aftur til Føroya at spæla við VB næsta kappingarár, og tað kemur málverjin Asta Armonaviciute eisini.

– Eg kann einki lova frammanundan, men vit fara at gera eina roynd at fáa eitt gott úrslit aftur næsta kappingarár, sigur Egill Steintórsson.


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.